# Toftamenn lata skip byggja

**Tórshavnar Skipasmiðja og smápartafelagið Hansa Maria á Toftum hava gjørt sáttmála um nýbygning, sum skal standa klárur á vári í 2005**

SKIPASMÍÐ
*Stefan í Skorini*



*Soleiðis fer tann nýggi tvídekkaði trolarin at síggja út. Tað er felagið Hansa Maria av Toftum, sum letur trolaran byggja*

Mánadagin 19. januar skrivaðu partarnir undir sáttmála um bygging av nýggjum trolara til landleiðina innanfyri tólv fjórðingar. Talan er um ein tvídekkaðan stáltrolara. Tað er smápartafelagið Hansa Maria, ið Hans Andrias Poulsen eigur, sum letur trolaran byggja.

Trolarin er 19 metrar langur og 5,75 metrar breiður. Hann fær ein 490 HK motor og lastar 550 kassar.

Sáttmálin er treytaður av, at fígging fæst til byggingina, og at felagið fær loyvi at flyta veiðuloyvið frá gamla bátinum til tann nýggja. Hetta skuldi bert verið ein avgreiðsluspurningur.

**Umráðandi ordri**

– Tað hevur stóran týdning fyri okkum at koma í gongd aftur. Vit vita, at førleikin versnar, um ov long tíð gongur ímillum tær stóru uppgávurnar, sigur Thormund Johannesen, ið hevur ábyrgd av nýbygningum og størri projektum á Skipasmiðjuni.

Fyri at vera kappingarfør í prísi verður skrokkurin smíðaður í Póllandi, og restin av arbeiðnum verður gjørt í Havn. Trolarin skal latast reiðarínum á flaggdegnum 2005.

Hetta er fyrsti nýbygningur hjá Skipasmiðjuni í tvey ár, tá skipasmiðjan bygdi ein lítlan alibát til Faroe Salmon í Klaksvík. Áðrenn hetta bygdi Skipasmiðjan Teistan á Skála og politibátarnar til Grønlands.

– Skipasmiðjan fegnast um, aftur at fáa ein nýbygning at gera, soleiðis at førleikin hjá monnunum at smíða og útgera skip verður varðveittur her á landi, sigur Poul Mohr, stjóri á Skipasmiðjuni.

# Endaspurturin sæst

**Í Klaksvík sæst valstríðið væl aftur í ár. Serliga við rundkoyringina og út eftir Klaksvíksvegnum hanga nógvar plakatir. Tær eru tó ikki nógv fleiri í tali í ár, men nakað størri í vavi**

VALSTRÍÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Valplakatirnar í Klaksvík komu fyrr upp at hanga í ár enn undanfarin ár. Sum oftast hevur tað verið so, at plakatirnar ikki koma upp fyrr enn kvøldið fyri sjálvan valdagin. Men í ár var tað munandi fyrr. Longu um vikuskiftið áðrenn valdagin vóru heilt nógvar plakatir at síggja runt í býnum. Og tað er ongin ivi um, at tær eru munandi størri í vavi í ár.

Eisini hava plakatirnar verið meira persónligar seinnu árini, enn tær hava verið áður. Fyri einum seks árum síðani byrjaði tað so smátt at vera meira og meira persónligt valstríð, og hevur hetta vundið uppá seg skjótt og sást serliga væl aftur í teimum mongu vøkru og litføgru plakatunum.

Hvussu úrslitið av valinum verður í norðoyggjum er ilt at spáa um, men fólk vænta eitt sera spennandi val. Størsta broytingin, sum kann fara fram er, um tað eydnast sambandsflokkinum at fáa ein umdømisvaldan.

Ein annar møguleiki, sum eisini hevur verið nevndur er, at norðoyggjar fáa fimm umdømisvaldar á ting. Men alt tað vita vit, tá endaliga valúrslitið er greitt.




*Valplakatirnar í Klaksvík eru ikki so nógv fleiri í tali til hetta valið enn undanfarin, men tær eru munandi størri í vavi*

†

Kunngjørt verður at okkara elskaða mamma, omma og vermóðir

**Elisabeth Vágsheim**
Vágur, ættað úr Saltangará

andaðist mánadagin 19. januar, 80 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*
**Ebba og Karstin**



*Vanliga hanga nógvar plakatir á norðara vegginum á Dagtilhaldinum, og tað er onki undantak í ár*





*Størsta valstaðið í landinum er ítróttarhøllin á Hálsi í Havn. 12.884 fólk hava rætt at velja her*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Anfinn Kallsberg var millum fyrstu veljararnar á Viðareiði*
*Mynd: Bárður Lydersen*



*Laura og Jógvan A. Joensen lótu eisini sínar atkvøður í morgun*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heimsmet í demokratii

VALLUTTØKA
*Jan Müller*

Valhølini lótu upp kring alt landið í gjár klokkan 10 og lótu aftur klokkan 20. Valrætt høvdu 34.423 fólk, sum eru umleið 1000 fleiri enn við seinasta val fyri umleið tveimum árum síðani. Heili 91,6% av teimum, sum høvdu valrætt seinast, fóru á val. Í Sandoynni var talið 93,3%. Hetta má sigast at vera eitt slag av heimsmeti í demokratii. Spennandi verður at síggja, um vit enn einaferð fara at seta slíkt met. Sjálvandi hava veðrið og árstíðin eisini nakað at siga, men eftir øllum at døma fór valluttøkan í gjár at vera methøg. Okkara fotografar kring landið vóru á nøkrum av valstøðunum í gjár. Millum fyrstu veljararnar, sum valdu í gjár, var sjálvur løgmaður, Anfinn Kallsberg, sum legði atkvøðuna í kassan í heimbygdini Viðareiði.

BESTSELLERANALYSA2003
- Donsk analysa av 20 teim populerastu sniðunum, eftir 4 árs ognartíð og 80.000 km. koyring

Prísir úr
118.750,-



HyundaiGetz inn sum Nr 1

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI

BOX 1070 · OYGGJARVEGUR · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 313707 · FAX 310855